Hetta nýggja slagið av vindmyllum er væl størri enn tær í fyrru ætlanini og fer hæddin upp til tornið úr 79 m til 92 m og veingjabreiddin fer úr 82 m til 117 m. Umsøkjari hevur sent visualiseringar av nýggju vindmyllunum frá somu staðsetingum sum tær í fyrru ætlanini, soleiðis at til ber at meta um visuellu broytingarnar, sí skjal *Visualiseringar – Enercon og Vestas*. Tað sæst sjálvsagt, at nýggju vindmyllurnar eru størri og fara tær at verða sjónligar frá størri parti av býnum, men við støði í innsendu visualiseringunum verður ikki mett, at broytingin av vindmylluslagi/støddini hevur stóra sjónliga ávirkan á umhvørvið, sæð frá útvaldu støðunum í býnum.

Umsøkjari hevur sent nýggjar simuleringar av óljóðinum, ið stendst av vindmyllunum. Hesar vísa, at tað ikki er stórur munur, á óljóðinum frá vindmyllunum í upprunaligu ætlanini, og nýggju vindmyllunum. Sambært umsøkjara, kemst hetta av, at veingirnir á nýggju vindmyllunum eru formaðar annarleiðis.

Umhvørvisstovan hevur lagt góðkenningina av Umhvørvisárinsmetingini og Umhvørvisgóðkenningina til hoyringar.

Broytingin av vindmylluslagnum krevur eina nýggja góðkenning frá Yvirfriðingarnevndini, og hevur nevndin fingið málið til viðgerðar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna broytingina av serstøku byggisamtyktini fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga smb. skjalinum *Broytingaruppskot*, treytað av:

- Loyvi frá Yvirfriðingarnevndini.
- At ljóðviðurskiftini verða kannaði, tá vindmyllurnar eru settar upp og smátturnar í F økinum eru bygdar. Um tað vísir seg, at óljóðstøðið er ov høgt í økinum, skulu viðkomandi vindmyllur steðgast ella niðurregulerast tey tíðspunkt, tá óljóðið er ov høgt.

Og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at umsitingin kannar við atliti til at vindmyllurnar eru staðsettar í einum tilrenningarøki, har drekkivatn verður savnað, um staðsetingin kann hava ávirkan á drekkivatnið í kommununi.

Kári Johansen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Tikið av skrá.

# 124/21 Umsókn um broyting av byggisamtykt á matr. nr. 98, Ryssan, Hvítanes

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 58/21 | 21/00489-2 |
| 2 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 124/21 | 21/00489-2 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 98, Hvítanes, hevur søkt um at broyta byggisamtyktina fyri økið, soleiðis at møguligt verður at byggja eini sethús á økinum.

**Lýsing av málinum**
Matr. nr. 98, Hvítanes liggur í 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu – øki ætlað landbúnaði. Um sethús skulu byggjast á ognini, skal økið broytast til B øki í byggisamtyktini fyri Hvítanes – øki ætlað sethúsum.

Eitt lítið B-sethúsaøki við tveimum sethúsum, liggur beint sunnan fyri ognina. Mett verður, at tað hevði hóskað seg at víðkað hetta B øki suðureftir, soleiðis at pláss var fyri einum sethúsum afturat, men at ein ávís frástøða framvegis verður hildin til fjøruna, sí kortskjal *Eftir broyting.* Sambært broytingaruppskotinum verður økið, ið lagt verður afturat B økinum, uml. 790 $m^2$ til víddar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B-øki í byggisamtyktini fyri Hvítanes eru m.a.:
- Økini skulu einans verða nýtt til sethús og bygd mugu verða einans stakhús, ið standa fyri seg við í mesta lagi 2 íbúðum í hvørjum húsi ella tvíhús til eitt húski í hvørjari húsaeind.

Ásetingar fyri 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru m.a.:
- 4. Grundurmáði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243
  Umsitingin arbeiðir við uppskoti um at endurskoða byggisamtyktirnar fyri bygdirnar í kommununi, harímillum Hvítanes. Hetta arbeiðið væntast at verða avgreitt í ár 2021/2022.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tá uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes er klárt at leggja til politiska viðgerð og hjá viðkomandi myndugleikum, eigur uppskotið at verða sent hesum til góðkenningar/hoyringar:
- Staðbundnu nevndini fyri Hvítanes.
- Náttúrufriðingarmyndugleikanum, av tí at økið liggur nærri bakkatromu enn 100 m.

**Skjøl**
- *Áðrenn broyting,* journal nr. 21/00489-3.
- *Eftir broyting,* journal nr. 21/00489-3.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís øki í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>29. april 2021 | Blað nr.: 487<br><br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 98, Hvítanes sambært kortskjalinum *Eftir broyting*, at fremja broytingina í sambandi við at byggisamtyktin fyri Hvítanes verður endurskoðað, treytað av loyvi frá viðkomandi myndugleikum, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Einmælt samtykt.

# 125/21 Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri økið matr. nr. 133a , Nólsoy til sethúsaøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 59/21 | 21/01022-4 |
| 2 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 125/21 | 21/01022-4 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 133a, við Malarenda í Nólsoy hevur søkt um at broyta byggisamtyktina fyri part av ognini. Ynskið hansara er at byggja eini sethús.

**Lýsing av málinum**
Matr. nr. 133a, Nólsoy, liggur í øki H, ætlað landbúnaði. Um loyvi skal vera at byggja sethús á ognini, skal tað broytast til eitt A øki.

Eitt lítið A øki við tveimum sethúsum, liggur beint sunnan fyri ognina. Mett verður, at tað hevði hóskað seg, at lagt ein geira av sethúsaøki á matr. nr. 133a, Nólsoy, fram við vegnum, sí skjal *Eftir broyting*. Soleiðis verður rúm fyri uml. 4 sethúsagrundstykkjum, sum hvørt er uml. 400 $m^2$.

Umsøkjari er hoyrdur hesum viðvíkjandi, og tekur undir við uppskotinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A øki í byggisamtyktini fyri Nólsoy eru m.a.:
- Loyvt er einans at byggja sethús við upp til 2 íbúðum og – eftir serloyvi frá bygdarráðnum – tvíhús, rað- og ketuhús o.t. til húski. Í sambandi við bústaðirnar skal tó bera til at innrætta høli til handlar, onnur vinnuendamál og stovnar, treytað av, at hesi virki ikki eru til ampa ella lýta dámin á økinum, sum sethúsabýlingi.
- Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 $m^2$ til støddar. Tá ið byggingin verður framd eftir byggiskipan, sum bygdaráðið hevur góðkent og tryggja ella eftir serstakari byggisamtykt, kann bygdaráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 400 $m^2$, tó í minsta lagi 320 $m^2$ fyri sethús (einhúskishús) og 260 $m^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av teirri ásettu minstuvídd kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki.

Ásetingar fyri H øki í byggisamtyktini fyri Nólsoy eru m.a.:
- Landbúnaðarøki t.e. bøur og lendi, sum ikki má byggjast á. Tað eru lendi, sum løgd eru av til landbúnað, varðveitingar av náttúru, fornminnum o.t. og til at fríðka um bygdina og gera hana dámligari at búgva í.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243
  Umsitingin arbeiðir við uppskoti um at endurskoða byggisamtyktirnar fyri bygdirnar í kommununi, harímillum Nólsoy. Hetta arbeiðið væntast at verða avgreitt í ár 2021/2022.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tá uppskoti til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Nólsoy er klárt at leggja til viðgerðar politiskt og hjá viðkomandi myndugleikum, eigur uppskotið at verða sent hesum til góðkenningar/hoyringar:
- Staðbundnu nevndini fyri Nólsoy.
- Náttúrufriðingarmyndugleikanum, av tí at økið liggur nærri bakkatromu enn 100 m.
- Fornminnismyndugleikanum, av tí at økið liggur nærri fornminnum enn 100 m.

**Skjøl**
- *Áðrenn broyting,* journal nr. 21/01022-5.
- *Eftir broyting,* journal nr. 21/01022-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 133a, Nólsoy sambært kortskjali *Eftir broyting*, at fremja broytingina í sambandi við at byggisamtyktin fyri Nólsoy verður endurskoðað, treytað av loyvi frá viðkomandi myndugleikum, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Kristian M. Skála, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

# 126/21 Fígging til smærri verkætlanir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.04.2021 | 25/21 | 21/01164-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 92/21 | 21/01164-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 126/21 | 21/01164-1 |

**Upprunin til málið**
Smærri verkætlanir, sum eru samtyktar í teknisku nevnd

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við hesar smærri verkætlanir, sum ætlast at verða fíggjaðar av 8110, er tørvur á at fáa pening av 8175, íløgur vegir, inn á 8110.

Grundgevingin fyri at fíggja verkætlanirnar á hendan hátt er tann, at verkætlanirnar kunnu byrja beinanvegin og at 8110, í verandi støðu, ikki hevur rúmd fyri nevndu ætlanum.

Verkætlanirnar, ið talan er um, eru:
Mál 21/00463. Parkeringspláss Millum Gilja, kostnaður 1.200.000 kr.
Mál 21/00921. Útbyggjan av parkeringsplássi handan Á, kostnaður 2.500.000 kr.
Mál 21/00297. Vegamótið Flatnavegur / Óluvugøta, kostnaður 1.000.000 kr.
Mál 21/00296. Vegamótið Villingadalsvegur / Norðari Ringvegur, kostnaður 1.000.000 kr.

**Tilsamans 5.700.000 kr.**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Talan er um flyting av peningi frá íløgukonto 8175 til rakstrarkonto 8110.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at:

- Tikið verður undir við, at nevndu verkætlanir kunnu byrja
- At flyta kr. 5.700.000 kr. av konto 8175, L00001 Løgukarmur fyri árið, á konto 8110.
- Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Ætlanin er at fáa verkætlanirnar at settar í gongd sum skjótast. Tí skulu omanfyrinevndu verkætlanir eftir ætlanin fíggjast sum serstakar nýggjar verkætlanir undir konto 8175, Vegir (íløgur).
Til at gera parkeringsplássið Millum Gilja er komið tilboð inn uppá 1.425 tkr. umframt kommunalt MVG, ella kr. 1.515 tkr. íroknað kommunalt MVG. Kostnaðurin fyri hinar verkætlanirnar byggir á innanhýsis metingar.
Ætlanin er at halda seg innanfyri karmin uppá 5.700 tkr. fyri allar fýra verkætlanirnar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at:

- Umsitingin fær heimild at taka av tilboðnum á tkr. 1.515 íroknað kommunalt MVG til at gera parkeringsplássið Millum Gilja
- At bjóða hini arbeiðini út
  Málið hereftir verður beint í býráðið

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari atkvøðu og ongari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Kristian M. Skála, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

# 127/21 Ynski um yvirtøku av Baraldsgøtu matr nr 1362c

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.04.2021 | 23/21 | 21/01210-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 93/21 | 21/01210-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 127/21 | 21/01210-1 |

**Upprunin til málið**
Íbúgvar, ið hava adressu á Baraldsgøtu, hava sett fram ynski um at kommunan yvirtekur vegin, Baraldsgøtu, Tórshavn, matr. nr. 1362c.

**Lýsing av málinum**
Vegurin varð gjørdur í.s.v. eina útstykking. Arbeiðstakarin, Sp/f Bjarni Poulsen, fór á húsagang, men stendur framvegis sum eigari av vegnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐
Tað eru ávísar ábøtur, ið eiga at verða gjørdar, men tað hevur ikki hast og kann gerast yvir nøkur ár og gjaldast av rakstri.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kommunan yvirtekur vegin uttan annan kostnað fyri kommununa enn matrikuleringsútreiðslurnar, og beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við Teknsiku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>29. april 2021 | Blað nr.: 494<br><br>Formansins merki: |

# 128/21 Nýtt vatnreinsiverk í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.04.2021 | 21/21 | 21/01263-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 94/21 | 21/01263-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 128/21 | 21/01263-1 |

**Lýsing av málinum**
Ynski er at fáa nýtt vatnreinsiverk í Kollafirði.
Gamla verkið er ótíðarhóskandi, og eisini er ynski um at fáa lendið, tað stendur á, knýtt at hjáliggjandi dagstovni.

Ætlanin er at staðseta nýggja vatnverkið á kommunala økið D2, beint vestan fyri Læknamiðstøðina við Sjógv. Stødd á bygningi er L 14 m x B 7,5 m x H 3,7 m.

Vatnverkið, ið hevur eina reinsiorku á 150 ts/h, verður eins og verkini í Kaldbak og Velbastað, t.v.s. við sandfiltrum og UV-geisling. Eisini hevur tað egna elveiting.
Tekniska útgerðin er frá P/F Nomatek, ið borgar fyri dygd og góðari tænastu.

**Fíggjarlig viðurskiftir.**
Játtaðar eru kr. 4 mió.
Tekniska útgerðin við uppseting kostar kr. 2.538.000, bygningurin er mettur til kr. 850.000, og aðrar útreiðslur s.s. el-arbeiði, uttandura rørarbeiði v.m. er mett til kr. 612.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingur og leiðarin fyri vatnveitingini mæla til,
- at heimila umsitingini at arbeiða víðari við verkætlanini, og at byrja arbeiðið skjótast møguligt, treytað av loyvdari staðseting á D2 økið.
- At kr. 4.000.000,- verða fluttar av konto 6775, L00001 Løgukarmur fyri árið, á konto 6775, Nýggj verkætlan “Vatnverk í Kollafirði”.
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Einmælt samtykt.

## 129/21 Innkomuvegurin kommunali parturin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 18/20 | 20/00776-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 103/20 | 20/00776-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 81/20 | 20/00776-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 09.06.2020 | 30/20 | 20/00776-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2020 | 127/20 | 20/00776-1 |
| 6 Tekniska nevnd | | | 20/00776-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 28.04.2021 | 102/21 | 20/00776-1 |
| 8 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 129/21 | 20/00776-1 |

**Upprunin til málið:**
Innkomuvegurin er gamalt mál, ið snýr seg um landsvegin og skipanina av ferðsluni á landsvegnum framvið høvuðsstaðnum, og til og úr høvuðsstaðnum.
Ymiskar loysnir og linjuføringar hava verið viðgjørdar, og Tórshavnar kommuna hevur havt serstøk ynski um ymiskar íbindingar.
Í 2016 gjørdu Landsverk og tekniska fyrisiting eitt uppskot til loysn og semju fyri loysnir, soleiðis at komast kundi á mál við innkomuvegnum, áðrenn Eysturoyartunnilin skuldi bindast í.
Hvørgin parturin hevur samtykt ætlanina, sum tískil ikki er bindandi millum partarnar.
Uppskot til loysn av innkomuvegnum, sum umsitingin hjá Landsverk og TK hava arbeitt við nú í 2019-2020 byggir uppá semjuna frá 2016, tó við tillagingum í mun til viðkomandi ætlanir sum nú eru og ynski sum eru frá báðum pørtunum.

Ferðslan í Føroyum økist støðugt, og er gongdin í talinum av skrásettum akførum smb. Hagstovu Føroya:

| Árstal | Skrásettir bilar í Føroyum | |
|---|---|---|
| | Persónbilar | akfør íalt |
| 2000 | 14.087 | - |
| 2010 | 19.873 | 29.891 |
| 2015 | 21.417 | 31.742 |
| 2019 | 25.226 | 37.292 |
| 2020 (mars) | 25.972 | 38.963 |

Sambært nýggjastu tølunum í 2020 heldur økingin fram.

Loysnin á innkomuvegnum er meira átrokandi nú tað nærkast at Eysturoyartunnilin verður liðugur og tikin í nýtslu, tí umframt økta bilatalið, fer ferðslan væntandi at gera eitt lop í sambandi við at sambandið verður betri á meginøkinum.

Løgtingið hevur játtað 11,0 mió. kr. til innkomuvegin á hvørjari síðu av Eysturoyartunlinum, og hava Landsverk og Tórshavnar kommuna arbeitt í felag við at raðfesta upphæddina, ið er sett av Streymoyarmegin.
Neyðugt er eisini, at Tórshavnar kommuna játtar neyðuga upphædd fyri at fremja tey átøk, ið Tórshavnar kommuna eigur ábyrgdina av í mun til Innkomuvegin.
*Sí skjal nr. 20/00778-1 Innkomuvegur radfesting*

| | Býráðsfundur<br>29. april 2021 | Blað nr.: 496 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í samgonguskjalinum stendur at “Endalig loysn skal finnast til vegainnføringina frá Eysturoyartunlinum”, og er hetta liður í tí arbeiðinum.
Landsverk og tekniska fyrisiting hava í felag gjørt uppskot til raðfesting av játtanini frá Føroya Løgtingi til innkomuvegin, og er neyðugt at Tórshavnar kommuna játtar neyðuga upphædd til at gera kanningar av hvussu íbindingarnar, sum Tórshavnar kommuna varðar av, skulu loysast og leggjast til rættis, soleiðis at tær verða gjørdar saman við innkomuvegnum.
Neyðugt er at íbindingar tryggja at ferðslan verður spjadd yvir ymisku høvuðsvegirnar í Havnini, soleiðis at hon ikki stúgvast á fáum vegum.
*Sí skjal nr. 20/00778-2 trafikmodel-forskellige scenarier*

Raðfestingin er gjørd við støði í nyttuvirðinum fyri ferðsluna í Havnini. Raðfesting 1, er sambandið millum Villingadalsveg og Klingruna, og vil hetta lætta um trýstið sum er á Løgmannabreyt og Flatarvegin sum er í dag. Tá hetta sambandið er komið, ber eisini til at umleggja bussleiðina, soleiðis at hon virkar betri.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Føroya landsstýri hevur sett 11,0 mió. kr. av í 2020 til innkomuvegin Streymoyarmegin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*20/00778-1 Innkomuvegur raðfesting*
*20/00778-2 Trafikmodel - forskellige scenarier*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
- at tikið verður undir við raðfestingunum, sí skjal 20/00778-1,
- at játtaðar verða 800.000 kr. av konto 8175 Vegir, L00001 Løgukarmur fyri árið, til nýggja verkætlan *Innkomuvegur Kommunali parturin*, til
  uttanhýsis ráðgeva, at gera neyðugar kanningar, prosjektering av teimum fyrstu íbindingunum
- kostnaðarmeting uppá at prosjektera og gera íbindingarnar, sum Tórshavnar kommuna varðar av, soleiðis at málið kann leggjast fyri nevnd aftur, fyri at fáa neyðuga játtan til prosjektering og gerð av íbindingum
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Rætting er til "Upprunin til málið" omanfyri

**"Teksturin:** Í 2016 gjørdu Landsverk og tekniska fyrisiting eitt uppskot til loysn og semju fyri loysnir, soleiðis at komast kundi á mál við innkomuvegnum, áðrenn Eysturoyartunnilin skuldi bindast í.
Hvørgin parturin hevur samtykt ætlanina, sum tískil ikki er bindandi millum partarnar.
Uppskot til loysn av innkomuvegnum, sum umsitingin hjá Landsverk og TK hava arbeitt við nú í 2019-2020 byggir uppá semjuna frá 2016, tó við tillagingum í mun til viðkomandi ætlanir sum nú eru og ynski sum eru frá báðum pørtunum."

**"Skal broytast til:** 7. Oktober 2016 gjørdu Samferðslumálaráðið og Tórshavnar kommuna avtalu um Innkomuvegin til Tórshavn
**skjal16/03841-1**
Avtalan varð samtykt í Tórshavnar býráð 20.06.2019, har heitt varð á landsmyndugleikarnar um at halda seg til avtaluna
**Skjal 14/01358-199**
Landsstýrismaðurin í Fíggjarmálum gjørdi á fundi við Tórshavnar kommunu 08.01.2020 vart við, at avtalan frá 7. Oktober 2016 ikki var samtykt í Løgtinginum, so ein loysn má finnast, sum báðir partar eru samdir um.
Uppskot til loysn av innkomuvegnum, sum umsitingin hjá Landsverk og TK hava arbeitt við nú í 2019-2020 byggir uppá semjuna frá 2016, tó við tillagingum í mun til viðkomandi ætlanir sum nú eru og ynski sum eru frá báðum pørtunum."

**Skjøl:**
**14/01358-199 Samtykt býráðsfundur 20.06.2019**
**16/03841-1 undirskrivað avtala um innkomuvegin til Tórshavn millum Samferðslumálaráðið og Tórshavnar kommunu**

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Føroya landsstýri hevur játtað 11 mió. árliga til at fremja innkomuvegin til Havnar. Tørvur er á játtan til kommunala partin av innkomuvegnum, soleiðis at kommunali parturin kann fremjast samstundis sum landsvegurin verður gjørdur.
Leingjan av Sundsvegnum, partur D-E er mestsum klárur at bjóða út.
Mettur tørvur á játtan til hendan teinin er uml. 10 mió. kr.

**Skjal:**
20-00778-1 Innkomuvegur raðfesting.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
- At játta 10 mió. kr. til at bjóða út og íverkseta part D-E av kommunala parti av innkomuvegnum sum eykajáttan.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. juni 2020:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2020:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2021:** Málið útsett.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Tikið av skrá.

## 130/21 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 34/21 | 21/00010-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 68/21 | 21/00010-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 68/21 | 21/00010-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 103/21 | 21/00010-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 96/21 | 21/00010-1 |
| 6 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 130/21 | 21/00010-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið. Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís øki í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. april 2021 | Blað nr.: 500<br><br>Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Framlagt og góðkent.

# 131/21 Orkuskifti hjá húsarhaldum í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 13.04.2021 | 22/21 | 21/01472-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 131/21 | 21/01472-1 |

**Upprunin til málið**
Elsa Berg býráðslimur hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Lýsing av málinum**
Skotið verður upp, at kommunan fer at arbeiða við málinum “orkuskifti hjá húsarhaldum í Tórshavnar kommunu” og at umsitingin í hesum sambandi fer at kanna, hvussu hesi átøk kunnu setast í verk í Tórshavnar kommunu:

1) at oljufýrar ikki verða loyvdir, tá nýggjar útstykkingar verða gjørdar.
2) at kommunan raðfestir upplýsing og ráðgeving til orkuskifti.
3) at oljufýrar skulu skiftast út innan eitt ávíst áramál. Dentur skal leggjast á, hvussu fíggjarliga sperdar familjur kunnu vera við í hesum orkuskiftinum.

Heimurin er í eini veðurlagskreppu. Vit síggja og merkja tað, og granskarar staðfesta tað. Kreppan er mannaskapt, og loysnirnar liggja tískil eisini í okkara hondum – lukkuvís.
Upphiting av bygningum stendur fyri áleið 10% av samlaða útlátinum í Føroyum. Loysnir á økinum eru tøkar, og seta vit átøk í verk fyri at skunda undir orkuskiftinum í kommununi, vil hetta koma umhvørvinum, samfelagnum og borgarunum til gagns.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Víst verður til:
- Heimsmálini
- Umhvørvispolitikkin hjá Tórshavnar kommunu
- Orkupolitikkin hjá Tórshavnar kommunu

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umhvørvispolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu “Grøna Leiðin” hevur m.a. hesi mál:

1) at allur hiti og streymur kemur frá varandi orku í 2030
7) at útlátið av vakstrarhúsgassi skal vera 50% lægri í 2025 samanborið við 2016

Í orkupolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu er m.a. ásett, at Tórshavnar kommuna vil (saman við hinum norðurlendsku høvuðsstøðunum):

1) “...ganga á odda í bardaganum móti veðurlagsbroytingum”
2) “...taka avgerandi stig á leiðini at minka útlátið av vakstrarhúsgassum”

Málið er, at minka útlátið av vakstrarhúsgassi niður um tey mál, ið londini hava sett hvør í sínum lagi.

Yvirskipað endamál hjá Tórshavnar kommunu er at minka útlát av $CO_2$ við at minka um orkunýtsluna og at leggja um til grønar orkukeldur.

Umhvørvis- og orkupolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu er í høvuðsheitinum um kommununa sum virkið og ikki um kommununa landafrøðiliga.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin tekur støðu til um umsitingin skal arbeiða víðari við málinum "orkuskifti hjá húsarhaldum í Tórshavnar kommunu" og gera tær kanningar sum eru nevndar omanfyri.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 13. apríl 2021:** Ein meiriluti, Bjørg Dam, Súna Mørk og Annfinn Brekkstein, vísir á at samgongan arbeiðir við málinum, sum verður lagt fyri nevndina aftur.

Ein minniluti, Elsa Berg og Gunvør Balle, ynskir málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um uppskot frá Bjørg Dam um at beina málið aftur í náttúru- og umhvørvisnevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum blonkum atkvøðum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Kristian M. Skála, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg og Gunvør Balle.

# 132/21 Økt játtan til orkupolitikk

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 132/21 | 21/01599-2 |

**Upprunin til málið**
Elsa Berg biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

**Lýsing av málinum**
Skotið verður upp, at játtanin til orkupolitikk verður økt munandi við at flyta 8.000 tkr. av løgukarminum 5775 langhylur á projektkonto 6177 orkupolitikkur.

Viðmerkingar:
Vit eru í eini veðurlagskreppu. Vit merkja og síggja tað, og granskarar staðfesta tað. Tað merkir, at støðan er hættislig, og at munandi átøk mugu setast í verk beinanvegin. Tórshavnar kommuna hevur sett sær sum mál at minka um útlátið av vakstrarhúsgassum, og at útlátið skal minkað við 50% í 2025 sammett við útlátið í 2016. Síðani málið bleiv samtykt, hevur vøkstur tó verið í útlátinum, og staðfestast kann tí, at tørvur er á nógv fleiri átøkum og eini munandi hægri játtan fyri at náa málinum og fyri at vera við til at basa veðurlagsbroytingunum.

Umsitingin hevur áður greinað útlátið hjá Tórshavnar kommunu og mælti í 2019 til, at 13.5 milliónir krónur vórðu játtaðar á hvørjum ári frá 2020 til 2025 fyri at røkka útlátsmálinum. Henda ætlan hevur ikki hildið.

Havið er kjarnin í føroyska samfelagnum. Havið er eisini kjarnin í okkara veðurlagsskipan og verður stórliga ávirkað av veðurlagsbroytingunum. Ítøkiligar avleiðingar eru m.a.: heitari sjógvur, havsúrgan, hækkandi vatnstøða, viknandi rák, vaksandi vindur og alduhæddir og ógvusligari ódnarveður. Árinini eru longu stór og fara at versna, um vit ikki seta munagóð átøk í verk, men samstundis sum veðurlagsbroytingarnar eru mannaskaptar, so avgera vit menniskju eisini, hvussu stór árinini verða.

Umframt teir umhvørvisbatarnar, sum eru av at seta fleiri pengar av til veðurlagsátøk, eru eisini fíggjarligir fyrimunir av at gerast óheft av oljuni. M.a. kann nevnast, at orkurokningarnar fyri bygningar og ljós minka munandi, og at íløgurnar í nýggjar orkuskipanir og ledljós tí verða spardar inn aftur. Raksturin av bilaflotanum verður eisini skynsamari í og við, at elbilar krevja minni viðlíkahald, og at tað er bíligari at løða bilin heldur enn at fylla olju í tangan. Basa vit veðurlagsbroytingunum, minka vit eisini um sannlíkindini av veðurvanlukkum og vanlukkukostnaðinum av teimum, umframt at kostnaðurin av sjóvarhækking minkar, av tí at hækkingin av bryggjukantinum ikki noyðist at vera eins stór.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. april 2021 | Blað nr.: 504<br><br>Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læittar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Málið umrøtt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. april 2021 | Blað nr.: 505 |
| | Formansins merki: |

# 133/21 Larmur frá skipum í Kollafirði og á Signabø

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 133/21 | 21/01615-2 |

**Upprunin til málið**
Ruth Vang biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

**Lýsing av málinum**
Við jøvnum millumbilum frætta býráðslimir frá borgarum um larm í Kollafirði og á Signabø. Vit fáa skriv bæði frá einstaklingum og frá felagnum Heimafriði. Eitt nú hoyrdu vit um ógvusligan larm um páskahalguna. Sambært íbúgvum í umráðnum, eru larmandi skipini munandi fleiri síðani ársskiftið, umframt at talan er um skip, har man áður hevur staðfest, at tey larma ov illa til at koma í havn.

Við støði í afturvendandi fráboðanum frá borgarum um sera nervandi larm, verður mælt býráðnum til í fyrstu syftu at umrøða málið, í øðrum lagi at finna varandi loysnir, soleiðis at lívstreytirnar í økinum gerast liviligar fyri allar borgarar.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Málið umrøtt.

# 134/21 Vernd av lívfrøðiligum margfeldi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 13.04.2021 | 20/21 | 21/01439-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 134/21 | 21/01439-1 |

**Upprunin til málið**
Elsa Berg, býráðslimur, hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Lýsing av málinum**
Málið eitur "vernd av lívfrøðiligum margfeldi", og skotið verður upp, at farið verður í gongd við at endurbøta vátlendi í kommununi.

Elsa Berg skrivar soleiðis:
Vátlendi eru serliga týdningarmikil, tá tað viðvíkur lívfrøðiligum margfeldi. Tey hýsa sjáldsomum djóra- og plantusløgum, sum bert trívast í hesum heilt serligu økjum.

Dømi um vátlendi er í Hoydølum. Ein endurbøting av økinum samsvarar eisini væl við skógfriðingina av økinum fram við Hoydalsá.

Endurbøting og vernd av vátlendum eru eisini eitt veðurlagsátak, í og við at vátlendi eru millum effektivastu vistskipanum til at upptaka og goyma kolevni. Um tey verða endurbøtt eru tey tískil við til at upptaka enn meir koltvíiltu úr lofthavinum (atmosferuni) og eru harvið við til at basa veðurlagsbroytingunum.

Endurbøtingin er í tráð við samtykta orkupolitikkin hjá kommununi, arbeiði við margfeldi til umhvørvisvikuna í 2020, ST sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi og París sáttmálan

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin umrøður málið, vit atliti til um umsitingin skal arbeiða víðari við málinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 13. apríl 2021:** Málið er umrøtt.

Ein meiriluti, Bjørg Dam, Súna Mørk og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka málið uppaftur seinni og tekur ikki undir við minnilutanum í verandi støðu.

Ein minniluti, Elsa Berg og Gunvør Balle, mælir til, at umsitingin kemur aftur við eini ætlan fyri skráseting og endurbøting av vátlendum.

**Ískoyti:**
Elsa Berg biður um at fáa málið á skrá til býráðsfundin.

Málið eitur "vernd av lívfrøðiligum margfeldi", og skotið verður upp, at:
1) Farið verður undir at endurbøta vátlendi í kommununi.
2) **Útbreiðslan av vátlendi í kommununi skal ikki minka.**

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um uppskot frá Bjørg Dam um at beina málið aftur í náttúru- og umhvørvisnevndina, ið varð einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>29. april 2021 | Blað nr.: 508<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 135/21 Eftirmeting av dagstovnaøkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 27.04.2021 | 105/21 | 21/00861-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 135/21 | 21/00861-1 |

**Upprunin til málið**
Annfinn Brekkstein, nevndarformaður

**Lýsing av málinum**
Skotið verður upp at eftirmeta dagstovnaøkið við tí endamáli at styrkja námsfrøðiliga arbeiðið á dagstovnaøkinum sum liður í at uppraðfesta økið bæði á dagstovnum 0-7 ár og frítíðarskúlar. Til tess skal setast arbeiðsbólkur at koma við uppskotum og tilmælum at leggja aftur fyri nevndina.

Uppskot til arbeiðssetning:

- Gerast skal tilmæli um, hvussu námsfrøðiliga arbeiðið á dagstovnaøkinum kann styrkjast og uppraðfestast viðvíkjandi námsfrøðiligum innihaldi, námsætlanum, dygd og normeringum bæði til starvsfólk og leiðarar.

- Gerast skal lýsing av heimildar- og uppgávubýtinum fíggjarliga, rakstrarliga og námsfrøðiliga millum stovnsleiðara, eindarleiðara og deild, og í hesum sambandi gera tilmæli til møguligar broytingar, sum kunnu styrkja námsfrøðiliga arbeiðið á dagstovnaøkinum.

- Gerast skal lýsing av námsfrøðiligu tilboðunum til børn við serligum tørvi, harundir námsfrøðiliga ráðgevingini og serstovurnar. Eisini skal meting gerast av fyrimunum og vansum, um játtanin til tímagrunnin verður roknað uppí vanligu normeringina til stovnarnar.

- Gerast skal tilmæli um møguligar broytingar í BARN-skipanini, harundir endurskoðan av upptøkureglugerðini, sum kann styrkja námsfrøðiliga arbeiðið.

Uppskot til arbeiðsbólkin:

- Eitt umboð fyri námsfrøðingarnar á dagstovnaøkinum
- Eitt umboð fyri hjálparfólkini á dagstovnaøkinum
- Eitt umboð dagstovnaleiðararnar
- Maika Samuelsen, uttanhýsis
- Trivnaðarstjórin
- Leiðarin á barna- og ungdómsdeildini

Tíðarætlan og tilgongd:

Arbeiðsbólkurin skipar sjálvur arbeiðsleist, harundir at fáa til vega upplýsingar frá umsiting o.ø. Miðað skal verða ímóti at lata mentamálanevndini tilmæli ella fyribils tilmæli í juni 2021.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Dagstovnalógin

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Er ikki latið øðrum deildum ella nevndum.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**
Eftirmetingin hevur í sjálvum sær ikki fíggjarligar avleiðingar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla nevndini til at taka støðu til málið.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2021:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, samtykkja arbeiðssetningin og at seta arbeiðsbólkin at eftirmeta dagstovnaøkið.

Ein minniluti, Ruth Vang, krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um uppskot frá Anfinni Brekkstein um at beina málið aftur í mentamálanevndina, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, einari ímóti, og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Kristian M. Skála.

Ímóti atkvøddi: Ruth Vang.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Gunvør Balle.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Elsa Berg | Jákup Dam |
| Gunvør Balle | Kristian M. Skála | Birgir Nielsen |
| | Ruth Vang | |